## Nýklaktur kommunal-politikari? Stjóri ella leiðari á almennum stovni ella á privatari fyritøku?

**Synergi skipar fyri intensivum skeiði í medietrening.**

TÍÐINDASKRIV
*Synergi*

**Sjónvarpið kemur um ein tíma!**
**v/TV2 Midt Vest**
*- frá hóttan til møguleika*

Fært tú ilt í búkin, hjartabankan, fer adrenalinið at pumpa, tá sjónvarpið ella annar miðil ringir og biður um eina viðmerking? Sigur tú altíð nei - tú hevur "ikki stundir"? Er sannleikin tann, at tú følir teg ótryggan, følir at tú dugir ikki at málbera teg greitt og beinraki, samstundis sum tú ert bangin fyri, hvussu tað, tú hevur sagt verður borið fram? Tú torir stutt sagt ikki at taka kjansin!

Ella hevur tú kanska drúgvar royndir í at luttaka í kjaki, bæði í sjónvarpi, útvarpi og øðrum miðlum? Manglar bert at fáa tað síðsta uppá pláss og eitt gott amboð at fáa boðskap tín fram?

**You're on!**
**- eitt handverk, tey flestu kunnu læra!**
Á skeiðnum lærir tú at síggja sjónvarp og aðrar miðlar, sum ein møguleika í staðin fyri eina hóttan! Tú fært innlit í, hvussu miðlafólk arbeiða, hvørjar framferðarhættir tey brúka, og tú lærir at føra boðskap tín fram stutt og greitt, til gagns fyri bæði teg og móttakaran.

Skeiðið vendir sær til øll, sum av og á eru at síggja á sjónvarpsskíggjanum og í øðrum miðlum, og sum ynskja hetta skal fara fram á best møguligan hátt.

Hesi tema verða á degnum!
* Tí er tað týdningarmikið at upptraðka í sjónvarpið og øðrum miðlum
* Soleiðis arbeiða journalistar
* Soleiðis fyrireikar tú teg til eina samrøðu
* Fleiri praktiskar venjingar frammanfyri sjónvarpskamera

**Hvat kanst tú rokna við, at fáa burturúr?**
Tá tú hevur luttikið á skeiðnum, kanst tú við størri sannføring úttala teg í t.d. sjónvarpi og útvarpi. Tú kanst føla teg tryggari í, at rætti boðskapurin kemur fram, umframt at kropsmálið og persónliga upptraðkanin er, sum hon eigur, í tílíkari støðu. Tú og journalisturin gerast meiri líkir samstarvsfelagar til gagns fyri allar partar.

**Skeiðini eru sera intensiv!**
Hetta merkir m.a., at bert 8 sleppa á hvørt holdið. Øll fáa persónliga vegleiðing. Skeiðið er bæði teoretiskt og praktiskt við m.a. venjing frammanfyri kamera.

**Skeiðsleiðarar eru Per Tornvig og Niels-Arne Hansen**
Per Tornvig er útbúgvin journalistur í 1993. Hevur m.a. starvast sum konsulentur í kommunikatión og leiðslu, verið kommunalreportari á dagblaðnum Holstebro-Struer. Síðani 2001 hevur hann starvast sum journalistur, skeiðútviklari og kampagneleiðari á TV2 í Holstebro (TV/MIDT-VEST).

Hann hevur undirvíst politikarum og starvsfólkum á kommunum og organisatiónum í medietrening.

Niels-Arne Hansen hevur starvast sum redigeringsteknikari og fotografur á TV2/MIDT-VEST síðani 2002.

**Tvey skeið – pláss er bert fyri 8 luttakarum á hvørjum.**
Skeiðini verða hildin í bestu skeiðshølunum á Hotel Føroyum "Varðanum" frá kl. 08.30 - 17.00. Fyrra skeiði er 19. november - her er bert 1 pláss eftir. Seinna skeiðið er 20. november – her eru nøkur pláss eftir. Seinasta freist at melda til er mánadagin 15. november á www.synergi.fo

# Evnisdagur um fosturtøku

**Felagsskapurin Føroya Pro Vita skipar leygadagin fyri evnisdegi, har ymisk evni viðvíkjandi fosturtøku verða viðgjørd. Øll kunnu taka lut og luttøkan er ókeypis. Fyrilestrahaldarar frá felagskapinum Tilflugten í Danmark eru við á evnisdegnum, sum verður í Útvarpshøllini**

FOSTURTØKA
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



Leygardagin verður áhugaverdur evnisdagur um fosturtøku í Útvarpshøllini. Tvinni evni viðvíkjandi fosturtøku verða viðgjørd og lýst.

Evnisdagurin er ætlaður øllum, ið hava áhuga í fosturtøkuspurninginum og er ætlanin, at luttakarar kunnu fáa sær hollari vitan um spurningin. Pro Vita metir, at evnið er viðkomandi fyri eittnú polittikarar, lógarsmiðir, starvsfólk innan heilsuverkið, mammur, pápar, prestar, samkomuleiðarar, tíðindafólk og fólk, sum hava verið við í kjakinum.

### Avleiðingarnar

Í kjalarvørrinum av fosturtøkukjakinum í seinastuni, hevur Pro Vita valt at lýsa avleiðingarnar, sum standast av fosturtøku, tí mett verður, at hetta hevur ikki verið frammi í kjakinum.

Pro Vita hevur samstarv við m.a. felagskapin Tilflugten í Danmark og koma tvey fólk frá Tilflugten at halda fyrilestur á evnisdegnum leygardagin. Tey eru hjúnini Elisabeth og Carl Sukkot. Dagurin er býttur í tvey evni og heitini á fyrilestrunum eru:
- Hví fáa nakrar kvinnur sálarligar trupulleikar av fosturtøku, og aðrar ikki ?
- Hvørja ávirkan hevur fosturtøka á familjuna ?

### Fyri lívinum

Evnisdagurin byrjar við morgunkaffi í Útvarpshøllini klokkan 10 og øll eru vælkomin at taka lut og luttøkan er ókeypis.

Provita er felagskapur, ið er fyri lívinum, sum navnið Pro Vita eisini ber boð um.

Og tað er júst tað, sum tað snýr seg um, og ikki hinvegin at vera ímóti, sigur ein av fyrireikarunum, Ólavur í Mittúni. Hann leggur dent á, at fólkini handan Pro Vita á ongan hátt eru fanatisk, men bert hugtikin av lívinum.

Pro Vita lýsir javnan við ráðgeving og Ólavur minnir á, at henda ráðgeving er professionell, tí har sita serkøn fólk og ráðgeva, jarðamøður og sjúkrasystrar. Afturat sær hava tær prestar, elstar og læknar.

Fyrra evnið á evnisdegnum byrjar klokkan 10:30 og seinna klokkan 13.

Skráin fyri evnisdagin er henda:
Kl. 10.00 Morgunkaffi
Kl. 10.30 Sangur, bøn
Kl. 10.40 Hví fáa nakrar kvinnur sálarligar trupulleikar av fosturtøku, og aðrar ikki ?
Kl. 12.30 Døgurðasteðgur (ókeypis ábit)
Kl. 13.00 Hvørja ávirkan hevur fosturtøka á familjuna ?
Kl. 14.30 Kaffi og høvi verður at seta spurningar.

*Framhald av síðu 7*

flokkin, sum er flokkurin, sum hann umboðar.

– Tað er einki nýtt, at Høgni og Jan Christiansen hava eitt tætt samstarv. Áðrenn vit yvirhøvur vóru komnir til samgonguborðið mikunáttina hevði Høgni gjørt eina undirhondsavtalu við Fólkaflokkin. Hetta varð eg greiður yvir alt fyri eitt, tí øll okkara ynski vórðu feia av borðinum, tí tað sigur seg sjálvt, at Fólkaflokkurin kveistrar alt til viks, tá teir frammanundan høvdu fingið avtaluna undir land. Høgni gjørdi júst tað sama fyri fýra árum síðan, greiðir Heðin Mortensen frá.

Heðin Mortensen sigur seg ongantíð hava mett Høgna Mikkelsen sum ein Sambandsmann, og at hann átti heldur at umboða Fólkaflokkin.

– Tú skalt minnast, at Høgni gekk 100 atkvøður aftur, meðan eg gekk 100 atkvøður fram, og tí er tað eitt sindur løgið, at hann skal stýra samgongusamráðingunum, sigur Heðin Mortensen

### Kaj Leo lýgur

Á hesari blaðsíðuni er Kaj Leo Johannesen endurgivin fyri at siga, at hann kendi einki til avtaluna, sum Heðin Mortensen einsamallur gjørdi við Javnaðarflokkin og Tjóðveldisflokkin. Hetta passar snøgt sagt ikki, sigur Heðin Mortensen.

– Tað er beinleiðis lygn, um hann sigur, at hann ikki varð kunnaður um samráðingarnar við Tjóðveldið og Javnaðarflokkin. Eg ringdi til hann fleiri ferðir, og onnur fólk, sum vóru til samráðingarnar, kunnaðu hann eisini, so Kaj Leo lýgur beinleiðis, um hann sigur, at hann ikki varð kunnaður, vísir Heðin á.

Heðin Mortensen heldur, at nýggjasta stríðið í Sambandsflokkinum er feskasta dømi um, at floksformaðurin hevur skotið seg sjálvan í skógvarnar. Heðin vísir á, at hann varð hóttur fleiri ferðir av limunum í Sambandsflokkinum í gjár

– Eg haldi tað er burturvið, at formaðurin í flokkinum skal leggja seg út lokalar ósemjur. Tað er eisini langt úti, at hann fer út í fjølmiðlarnar at hótta meg. Sambands flokkurin hevur verið ótrúliga skjótur at útihýsa meg, tí tað er ikki meir enn eitt døgn síðan, at avtalan varð undirskrivað, sigur hann.

Heðin Mortensen hevur seinastu mongu árini fingið eitt ótal av persónligum atkvøðum, bæði á býráðsvali og løgtingsvali.

*Kennir Kaj Leo seg hóttan av tær í Suðurstreymi?*

Tað dugi eg ikki at siga, men tað kann vera.

### Onga fráboðan

Heðin Mortensen heldur tað er ógvuliga løgið, at hann hvørki hevur hoyrt orð ella ei úr Sambandsflokkinum, áðrenn hann hoyrir í Útvarpinum, at hann hevur fingið tilboð um at verða skotin ella hongdur av sínum egnu, sum hann málber.

– Tað er ein longri prosedura, sum Sambandsflokkurin skal ígjøgnum, um eg skal útihýsast. Eru teir so glaðir fyri at útihýsa meg, so skulu teir í minsta lagið gjøgnum aðalfundin og møguliga landsfundin. Eg havi ikki beinleiðis tikið støðu enn, og tí kann eg ikki siga, hvat hendir. Eg fýlist á, at flokkurin í einum jánkasligum tíðindaskrivi letur vera við grundgeva, hví eg skal úr flokkinum.

*Er tað ikki nóg mikið, at tú hevur brotið eina bindandi avtalu?*

Eg havi sagt tað fleiri ferðir, og eg endurtaki tað fegin. Eftir vánaliga valið, har vit nærum mistu tveir býráðslimir, sigur tað seg sjálvt, at flokkurin verður styrktur av at hava borgarstjóran í eini samgongu, heldur enn at spæla eftir pípuni hjá Fólkaflokkinum, sigur Heðin Mortensen.

Hann heldur fast um, at hann sá ikki avtaluna við Fólkaflokkin sum annað enn eina fyribilsavtalu.

### Óvist

Tað er nógv sum talar fyri ,at Heðin Mortensen ikki verður í Sambandsflokkinum serliga leingi afturat, tí eitt samt Føroya Væl vil hava hann úr flokkinum. Høvuðspersónurin sjálvur hevur ikki gjørt av, hvør hansara politiska framtíð verður.

Heðin hevur í sínum ungum døgum havt tilknýti til Javnaðarflokkin, hóast hann ongantíð var uppstillaður, og hann hevur eisini roynt seg sum uttanflokkamann í Tórshavnar býráð.

*Kann tað hugsast at Heðin Mortensen verður at síggja í Javnaðarflokkinum?*

Nei tað veit eg ikki, men eg skal ikki útihýsa nøkrum. Satt at siga kann ikki siga tað stóra um mína politisku framtíð í løtuni, tí eg veit ikki hvat hendir, sigur hann



## Samfelagsmøti

**verða í døgunum 10.–14. november 2004**

### Í Ebenezer

| | | |
|---|---|---|
| Mikukvøldið | kl. 20.00 | Bønarmøti |
| Hósdagin | kl. 10.00 | Uppbyggingarmøti |
| Hósdagin | kl. 16.00 | Uppbyggingarmøti |
| Hóskvøldið | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Fríggjadagin | kl. 10.00 | Uppbyggingarmøti |
| Fríggjadagin | kl. 15.00 | Uppbyggingarmøti |

### Í Ítróttarhøllini á Hálsi

| | | |
|---|---|---|
| Fríggjakvøldið | kl. 20.00 | Evangeliskt møti |
| Fríggjakvøldið | kl. 22.30 | Opið hús |
| Leygardagin | kl. 16.00 | Uppbyggingarmøti |
| Leygarkvøldið | kl. 20.00 | Evangeliskt møti* |
| Leygarkvøldið | kl. 22.30 | Opið hús |
| Sunnudagin | kl. 10.00 | Breyðbróting |
| Sunnudagin | kl. 12.15 | Barnamøti |
| Sunnudagin | kl. 16.00 | Uppbyggingarmøti* |

**Nátturði verður í Høllini beint eftir møtið**

| | | |
|---|---|---|
| Sunnukvøldið | kl. 19.00 | Evangeliskt møti* |

* Deyvatolking verður á hesum møtum

*Øll eru hjartaliga vælkomin!*

## Koyrikort?

Nýggj teoriskeið
til persónbil, byrja
**mánadagin 15. november,**
til lastvogn, buss og trailara
**mánadagin 15. november**
**kl. 19.30,**
og motorsúkklu
**týsdagin 16. november**
**kl. 19.30**

FØRARASETRIÐ
K O Y R I S K Ú L I

**Stanley A. Olsen**
koyrilærari
**tel 21 10 99 • 21 10 96**

**John A. Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 75**

Jekaragøta 10 • Tórshavn

SISERO 351800

## Handilslærlingur søkist

Kundi tú hugsa tær eina framtíð innan handilsverðina?

Vit hava brúk fyri einum handilslærlingi (m/k).

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt avbjóðandi starv í eini spennandi vinnu, har tú gerst partur av einum góðum toymi, og har arbeiðsandin er av teim bestu
- Tryggar arbeiðsumstøður
- Góðar møguleikar fyri persónligari menning

Tú mást hava HH ella FHS prógv.
Lærutíðin er ávíkavist 2 ella 3 ár.
Tú mást vera fryntlig/-ur, samstarvsáhugað/-ur, ágrýtin og til reiðar at taka við nýggjum lærdómi og ikki vera bangin fyri at taka eina hjálpandi hond í tá á stendur. Til tíðir kann vera sera nógv at gera.
Vit eru í holt við at umvæla og vaksa um handilin, so tí hevur tú møguleikan at seta tíni fingramerki á, hvussu handilin í framtíðini skal síggja út.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til okkara og tosa við Jan Danielsen, stjóra.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn saman við prógvum og ummælum í seinasta lagi 23. november 2004.

pf Klement Petersen

Tlf. +298 447560 · Fax +298 448460
e-mail: jandan@klementpetersen.fo

*Pf. Klement Petersen er ein fyritøka í støðugari menning, sum í løtuni hevur 10 fólk í starvi. Vit selja í høvuðsheitum tilfar til byggivinnuna og til hús, so sum køkar, hvítvørur, tak, gólv o.m.a.*

## Útbjóðing

Við hesum verður arbeiðið í sambandi við gerð av einum 200 m longum útstykkingarvegi í Norðragøtu boðin út í almennaðari lisitastión.

Lisitatiónin verður á kommunuskrivstovuni við Gøtugjógv týsdagin 30. november 2004 kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið kann bíleggast til, í seinasta lagi týsdagin 16. novembur við at gjalda kr. 5.000,- í veðhald á konto nr. 6460-165 7404 í Føroya Banka.

Veðhaldið verður afturgoldið, um útbjóðingartilfarið er aftursent, í seinasta lagi, eina viku eftir lisitastiónina.

**sp/f Teknistovan**
v. Jens Kl. Jacobsen og Henning Olsen
ráðg. Byggifrøðingar
FO- 510 Gøta
tel: 44 21 05 · fax: 44 21 07
email: klement@post.olivant.fo

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 162,
**P/F Vestmanna Timburhandil,**
**350 Vestmanna.**

**Viðtøkur broyttar:** 20.10.2004.
**Strikan av hjánavni:** P/F Fjarðahús.
**Nýtt navn:** P/F Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð
**Nýtt hjánavn:** P/F Vestmanna Timburhandil (P/F Fjarðahús, Timburhandil & Byggibúð)

Skráseting Føroya
tann 10. november 2004

Kristin Balle

veitst tú ikki tað?
Sosialurin

## Bilar til sølu

**Nissan Almera 1,5 bensin**



· Árg. 2002 · Km 26.000
· 5 hurðar, air-condition, el-rútar framman, el-spegl, hita í setrinum

*prísur* **125.000,-**

**SsangYong Musso 2,9 TD 4WD**



· Árg. 1999 · Km. 75.000
· Vørubilur, 5 hurðar, el-rútar, tónaðir rútar aftan, krók, lættmetal felgur, heilársdekk

*prísur vi MVG* **147.000,-**

BILVERKSTAÐIÐ
v/ H.J.Kollsker · á Hjalla
Tel 31 10 13 · Fartel 51 10 13
Boks 3262 · FO-110 Tórshavn
www.kollsker.com

## Skattalistin

Skattalistin fyri Hvalvíkar kommunu fyri árið 2003 liggur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 12. novemner til 23. november 2004.

Kommunuskrivstovan er opin mánadag til hósdagin frá kl. 8.00 til 13.00.

**Hvalvíkar kommuna**

Lesið Sosialin -tað loysir seg

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3567,
**Sp/f 26.05.03, 100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:** 09.11.2004.
**Nýtt navn:** Sp/f Handilskjarnin v/Hans Waag

Skráseting Føroya
tann 10. november 2004

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 2413,
**P/F Handilskjarnin,**
**100 Tórshavn.**

**Viðtøkur broyttar:** 15.10.2004.
**Strikan av hjánøvnum:** P/F Leikadeildin, P/F Skódeildin, P/F Harradeildin og P/F Damudeildin.
**Nýtt navn:** P/F 2/1 - 1995

Skráseting Føroya
tann 10. november 2004

Kristin Balle

Sosialurin Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

## Hundahvølpur

Labrador Retriever, svartur, 4 mðr., hevur ættartalvu. Innfluttur úr Danmark.

Verður bert seldur til djóravin við góðum umstøðum.

Kostnaður kr. 5.000,00.

**Tlf. 217072**